# Vitan & Vøkstur

NLH 22.09.2011

Rúni Weihe

**Vitan og vøkstur** ganga hond í hond. Fyri at skapa størri vøkstur landi og fólki at frama, vilja vit seta gransking, menning og nýskapan í fokus. Visjónin er, at vitanararbeiði skal bróta slóð og menna samfelagið. Størri virði skulu fáast úr okkara tilfeingi, nýggjar vinnur skulu mennast, og samfelagið skal skipast betri. Útflutningsvirðið verður størri, búskapurin sterkari og samfelagið liviligari.

Vit fegnast um, at fyrsti yvirskipaði granskingarpolitikkur Føroya nú er samtyktur. Við politikkinum seta vit mál við gransking, menning og nýskapan og skapa karmar um hetta virksemið. Kósin er sett. Nú skal politikkurin fremjast í verki. Hetta krevur vilja og samstarv á øllum stigum. Vit eru sannførd um, at granskingarpolitikkurin og atknýtt átøk fara at føra okkara samfelag longur framá.

## Betri skipanir og lógarkarmar fyri íløgur í gransking, menning og nýskapan

Skipanir verða settar í verk, sum stimbra nýskapan og eggja vinnuni at gera íløgur í gransking og menning. Yvirskipaðu politisku ætlanirnar á ymsu økjunum, sum umskarast, skulu samskipast og lagast til nýggja hugburðin.

## Stuðulsmøguleikar til flytføri

Tað er sera týdningarmikið at fáa íblástur útifrá, við at okkara granskarar fara út um landoddarnar, eins og útlendskir granskarar eiga at verða bodnir hendanvegin. Føroysk gransking avspeglar tann tørv og teir møguleikar, vit hava í samfelagnum. Í summum førum eiga vit tilfeingi, sum onnur ynskja at brúka og vilja gjalda fyri. ES-granskingarsamstarvið er ein av miðlunum til at styrkja munandi um granskingarkarmar og -umhvørvi.

People skipanin í FP7 (ES) er væl egnað til okkara smáu viðurskifti og hevur góðar møguleikar at senda fólk út og taka ímóti fólki. Tað snýr seg í flestu førum um einstakar granskarar, ið taka stig til at granska ein ítøkiligan spurning. Talan er um spurningar, ið vit sjálvi eru áhugað í, og sum ikki eru stungnir út í kortið av eini størri stuðulsskrá ella granskingartoymum. Vit kunnu økja um møguleikarnar at gagnnýta People skipanina við at gera serliga lagaligar skattaskipanir fyri útlendskar granskarar, sum flyta til Føroya í avmarkaða tíð.

## Vinnan má eggjast til at granska og menna

Hóast nógv tos um vinnugransking kann staðfestast, at føroyska vinnulívið í miðal ger lutfalsliga fáar íløgur í gransking og menning. Hetta er neyðugt at broyta, og tí mugu skipanir setast í verk, sum kunnu eggja vinnuni at gera íløgur í økið. Bæði í Íslandi og Danmark eru góðir frádráttarmøguleikar fyri granskingar- og menningaríløgur, íverksetarastuðul og vinnuligar Ph.D.-verkætlanir. Hetta eru skipanir, vit eiga at kanna nærri.

Tað eru dømi um gott samstarv millum gransking, menning og vinnu í Føroyum. Alivinnan er eitt tað besta dømið um góð úrslit, sum eru skapt í einum neyvum samstarvi. Fiskaaling granskar og leggur fram úrslit, ið koma allari alivinnuni til góðar.

Innan KT-økið eru dømi um stórar skipanir, sum eru mentar í samstarvi millum vinnuna og almennar stovnar, m.a. Búskaparskipan Landsins og Talgilda Heilsuskipanin.


skattefunn.no




- Ikki beinleiðis stuðul
- G&M kostnaður mótroknaður sum skattafrádráttur

- Ein skipan ið eggjar og motiverar fyritøkum at seta G&M aktivitetir í gongd!
  – Hugskot/intiativ frá vinnuni, men eisini frá óheftum granskarum!


HAVSBRÚN
Data SIO, NOAA, U.S. Navy, NGA, GEBCO
Image IBCAO
Image © 2011 TerraMetrics
© 2011 Cnes/Spot Image
65°27'58.56"N 5°39'24.39"V niveau -3044 m
©2010 Google
Øjehøjde 2332.54 km

- Implementera sum skjótast skipanir, ið eggja vinnulívinum at seta fer á G&M.
  - Vinnu Phd, skattafrádrátt osfr..

- Karmar eru onki uttan aktivitetir!……………